# Hvarvinum





Trappan niðan til veðurstøðina er 288 trin

vera ein ung føroysk genta. Eg spurdi hana, hvat hon gjørdi her, hon segði, at hon vitjaði pápa sín, sum at Jaspur Midjord, tey vóru úr Vági og høvdu hoyrt um hendan áhugaverda túrin, so hon hevði teknað seg til. Í forhold til tann fyrra túrin, sum bleiv gjørdur fyri tveimum árum síðan, tá vit fóru eystur gjøgnum sundið og tóku havnirnar vestur yvir, fóru vit fyrst í Kapphavnina og tóku túrin eystur yvir og so vestur yvir, gjøgnum sundið.

Vit komu so í Kapphavnina, tað var stilli og bakandi sól. Tað bleiv farið í land har, sum føroyingarnir høvdu húsast fyri góðum 45 árum síðan, har var alt samanfallið av tíðarinnar tonn, tað blivu tiknar nógvar myndir. Moyggjabitarnir vóru ein stór plága har.

Vit fóru so yvir á Kirkjugarðsnesi og so síðan eystur gjøgnum Ikakfjørðin, eystur til bergið, sum vit kallaðu tað, tað var eysturarmurin av Vatnfjørðinum. Har tóku vit myndir. Síðan var farið inn í Vatnhavnina har, sum nøvnini av ymiskum skipum vóru málað á klettarnar.

Síðan bleiv lagt stilt, og vit fóru at fáa okkum ein bita. Eftir tað bleiv farið yvir til Grýluvíkina, har sigldu vit runt og tóku myndir, síðan bleiv farið yvir til hylin. Vit høvdu toskatráður við, so vit løgdu stilt við Grønanes, at prøva um nakað livandi var at fáa. Nei, vit føldu hann ikki. Grønanes var tað nesið, sum lá beint uttan fyri hylin: Komnir yvir í hylin var farið í land, fyri at taka myndir og fyri at síggja hvussu hylurin var háttaður, so var farið innanskers til veðurstøðina Prins Kristian.

## Skálvíkingur á veðurstøðini

Tað tók okkum ein hálvan tíma at stima norður til veðurstøðina, har var ein lítil pirur at liggja við, veðrið var gott, so báturin lá væl. Vit fóru so í land, so var tað tann langa bratta trappan, vit skuldu upp ígjøgnum, húsini stóðu uppi á einum ryggi, eg taldi trinini, tað vóru 288 trin. Komin næstan niðan á slætt, kom ein maður oman ímóti okkum. Eg kendi hann beinanvegin aftur frá seinasta túri, tað var ein skálvíkingur, sum eitur Trúgvi Karlson. Hann hevði búð í Nanortalik í 35 ár og hevði familju har, hann var ógvuliga blíður. Vit fóru inn í kantinina og fingu ein góðan kaffimunn, so bleiv prátað og fortalt. Eg spurdi hann, um tað var langt síðan, hann hevði verið í Føroyum, hann svaraði, at hann ikki hevði verið í Føroyum í 35 ár. Tá vit vóru liðug at drekka kaffi, fóru vit út at taka myndir, útsýnið var ógvuliga gott. Har arbeiddu 5 fólk. Tá eg var har í 1960 arbeiddu 45 fólk har, nú er alt blivið automatiserað, alt gongur fyri seg har norði í Grønnedalen. Vit steðgaðu í hálvanannan tíma har, so fóru vit vestur í gjøgnum Prins Kristiansund. Málið var bygdin Apiladog, har 160 fólk búgva.

Tá vit komu inn ímóti bygdini, sóu vit nógvar smábátar, sum fiskaðu. Har var nógvur fuglur, og teir fingu væl av fiski. Vit høvdu toskatráðurnar við, so vit prøvaðu eisini. Jú, nú bar til, vit fingu eisini væl. So var farið inn í bygdina, vit fóru í land at taka myndir og hyggja okkum um. Sum altíð var farið inn í kirkjuna at hyggja. Hon var ikki stór, men ógvuliga hugnalig. So var farið avstað aftur, nu var kósin sett til Fredriksdal, har vit settu gentuna av, síðan beinleiðis til Nanortalik.



Julianehåb

Vit tóku so saman um túrin, og allir vóru á einum máli, um at hetta var ein fantastiskur túrur við síni náttúru og vakurleika. Alt lá órørt har. Hetta var fríggjadagur, og tá ið vit vóru lidnir við túrin í Nanortalik, hevði tað verið eitt gott hugskot at farið norður til Julianehåb, at halda vikuskifti. Tað var jú áleiðis norður til Narsarsuak, har vit skuldu flúgva heim. Vit bóðu ferðaleiðaran um at skaffa okkum billettir við tyrluni - og eina íbúð. Tað skuldu hann nokk klára.

## Hoyrdi at vit vóru føroyingar

Vit fóru kl. 9.00, beinleiðis til Julianehåb, tað tók 25 minuttir at flúgva. Ein maður tók ímóti okkum og koyrdi okkum til íbúðina. Um døgurðatíð fóru vit inn á Sjómansheimið at fáa okkum døgurða. Tá kom ein føroysk dama har, hon hoyrdi at vit vóru føroyingar. Hon var leiðari av sjómansheiminum og bjóðaði sær at koyra okkum runt í býnum og vísa okkum tað, sum var vert at síggja. Hon segði, at hon var úr Tórshavn, pápi hennara var ein pensioneraður postmaður, eg haldi at hann æt Sámal Clementsen. Vit takkaðu fyri túrin og fóru oman á kajina. Eg kenni ein føroying, sum siglir sum trolaraskipari har og spurdi ein grønlending um hann kendi ein føroying, sum førdi ein trolara har. Jú, hann peikaði á trolaran, sum lá har. Vit fóru so yvir til hann. Har bleiv eitt øgiligt reyp, men sannheit skal tað vera, teir fingu nógvan fisk. Hann segði, at teir sigldu seks tímar frá býnum, so bleiv kastað. Teir lógu fyri tað mesta stillir og reinsaðu.

Vit fóru so víðari. Har búðu eini 3.500 fólk í býnum, eisini vóru nógvir nógvir gestir komnir til býin vegna tað at grønlendska fótbóltsmeistaraskapið bleiv spælt hetta vikuskifti. Tað lokala sjónvarpið sendi allar dystirnar. Leygardagin blivu teir innleiðandi dystirnir spældir, og sunnudagin blivu semifinalurnar spældar, og mánakvøldið bleiv finalan spæld. Sunnumorgun fóru vit í kirkju, tað var ein nýggj nýmótans kirkja, ein flottur bygningur. Síðan var farið at vitja tey ymisku søvnini.

Mánadagurin var síðsti dagurin í býnum, vit keyptu ymiskar lutir av Grønlandi til minnis um túrin. Týsmorgunin kl. 8.00 bleiv flogið norð til Narsarsuak, har vit skuldu flúgva heim kl. 15.10 via Reykjavík. Vit komu í Vágar kl. 22.30. Ein minniligur túrur var at enda komin.